†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Sjúrður á Kósini** fer av Klaksvíkar Sjúkrahúsi sunnudagin klokkan 16 í Christianskirkjuna. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni mánadagin klokkan 13.

# Takk

Eg vil hjartaliga ynskja øllum, sum mintust meg á 70 ára degnum.

Somuleiðis vil eg eisini ynskja vinum og kenningum eini gleðilig jól og eitt av Harrans signað nýggjár.

**Heilsan**
**John Oluf Jacobsen**

# Takk

Øllum tykkum sum á ymskan hátt mintust meg á 80 ára degnum, takki eg hjartaliga.

Samstundis ynski eg tykkum eini gleðilig jól og Guðs signing í tí nýggja árinum.

**Blíðar heilsanir**
**Solveig Strøm**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá okkara kæra kona, mamma, vermamma og omma

**Mona Haraldsen**

andaðist og var jarðað.
Tøkk til Sverra Steinhólm fyri troystarík orð í kapellinum.
Tøkk til Ingu P. Dam fyri troystarík orð í heiminum og kirkjuni. Tøkk til kirkjutænarar, sangarar og berarar. Tøkk til tykkum, sum hjálptu til við jarðarferðini.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Føroya Blindafelag.
Eisini takka vit øllum, sum fylgdu Monu til hennara seinasta hvíldarstað.
Tykkum øllum ynskja vit eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

*Fyri tey avvarðandi*
**Hallur, Toni, og Birgit**

## Minningarorð um

# Jens Reinold Olsen, Toftir

**10. september 1944 - 11. november 2008**

Nú er Jens Reinold farin foldum frá ,bert 64 ára gamal.

Kom at kenna Jens Reinold, tá ið systirdótturin og eg komu saman fyri gott 20 árum síðan.

Møtti Jens Reinold eisini á Landingarmiðstøðini á Toftum, tá ið landað var har og annars til familjufestir.

Jens Reinold var ein sera fittur persónur og eitt gott menniskja, hann var altíð sera blíður, tá ið okkur komu inn hjá teimun báðum Hanna og honum.

Jens Reinold visti ikki hvussu blíður hann skuldi vera, hann hevði altíð okkurt gott at seta á borðið, køkur og annað góðgæti til børnini, Hanni hann sat og flenti og ordnaði “beiggi gev teimum okkurt gott”.

Tað var altíð sera hugnaligt at koma út at vitja til høgtíðir, og sum prestur



og Poul Færø søgdu, at tað var so hugnaligt, at koma innar til teir, reint og ruddiligt, serliga til jólar við øllum jólapyntinum.

Jens Reinold gjørdist sjúkur fyri tíð síðan, og tá ið okkur vóru har úti og vitjaðu, sá eg hvussu nógv hann var afturfarin, hann var sjúkur og tað var ikki nakað at takað feil av.

Fyrr í heyst ringdi hann til mín og spurdi um eg kundi koma at hjálpa sær við sjónvarpinum, jú eg leyp avstað, tá ið eg kom inn, tá sá eg, at krabbin hevði fingið fastatøkur á hesum góða menniskja.

Eg var eftir nátungum í ár ,og hann spurdi um teir ikki kundi fáa eitt kók, hann mungaði so nógv eftir einum kóki, jú tað var gamaní, teir fingu eitt kók. Tá sigur Jens Reinold, ”ein havhestaungi er nokk hjá mær til 4 máltíðir”, tá tonkti eg, nú er ikki nógv gott eftir.

Jens Reinold var ikki giftur og átti eingi børn, men hann var sera góður og fittur við okkara børn, og øll børn í familjuni, minnið eftir hann standa sterk.

Tað verður undarligt at koma inn í heimið á Toftum, hvar tann yngsti beiggin ikki er at hitta.

Hanni, Essemi, Meinhard og Poula hava mist ein góðan beiggja og ein góðan vin, tað hava okur øll gjørt.

Jens Reinold visti sjálvur hvønn veg tað bar nú, og vildi bert sleppa foldum frá, hann bað bróðursonin leggja streym í gangin, so at Hanni kundi fáa jólaljós í gangin, so tað kundi vera hyggiligt hjá honum á jólum.

Tá hevur Jens Reinold vita at hansara ”log” snurrar ikki leingið afturat.

Má Harrin styrkja tykkum syskin við maka í hesu sváru tíð, nú tit hava mist ynsgta beiggjan beint undan jólum, bert 64 ára gamal.

Við hesum fáðum orðum fari okur at minnanst Jens Reynhold Olsen.

**Súsanna, Eli og døturnar**

# Tøkk



Vit vilja við hesum takka øllum, sum við gávum, telegrammum og á annan hátt gleddu okkum á silvurbrúðleypsdegnum tann 15.okt. 2008.
Eisini vilja vit takka tykkum øllum, sum vóru saman við okkum í bygdarhúsinum í Leirvík og gjørdu dagin ógloymandi fyri okkum. Harrin signi tykkum øll.
Vit ynskja vit øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað nýggjár við tøkk fyri alt í brátt farna ári.

**Edva og Elibert Jacobsen**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá okkara kæri pápi, verpápi, abbi og bróðir

**Jón Símun Jensen**

andaðist og var jarðaður.
Takk til Jákup Reinert Hansen, prest, fyri góð orð, og takk til tykkum, ið hjálptu til við jarðarferðini og ervið.
Somuleiðis takka vit øllum, sum fylgdu honum til seinasta hvíldarstaðin.

*Fyri tey avvarðandi*
**Siri**

**Dagurin**
**22. november. Cecilia,** deyð umleið ár 225. Rómversk genta, sum frá barnsbeini hevði verið kristin. Foreldur hennara góvu hana í hjúnalag við heidnan ungan mann, Valerianus, men sjálva brúðarnáttina umvendi hon hann. Varð tikin av døgum í Róm sum pínsluváttur. Rómverskt ættarnavn, ið merkir tann blinda. Nikolai Mohr føddur hendan dagin í 1742
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*